BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

30. november 2023
Mál: 22/22133-52
Viðgjørt: JáR

Svar

upp á

§ 52a fyrispurning nr. 52-045/2023 frá Biritu Matras Petersen, løgtingskvinnu, um ókeypis alment ferðasamband til lesandi og næmingar alt árið, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at tryggja lesandi og næmingum bíligari ella ókeypis alment ferðasamband alt árið?
2. Hvørjar eykaútreiðslur fær landið, um skúlakortið er virkið alt árið?

Svar

Til 1: Verandi skipan virkar eftir avtalu millum Studna og Strandferðsluna. Sambært hesi skipan kunnu lesandi og næmingar ferðast aftur og fram í skúla ókeypis einaferð um dagin uttan mun til fjarstøðu frá skúlanum. Skúlakortið kann brúkast í 11 mánaðir, men ikki 1 mánað, tá summarfrítíðin er. Eingin ítøkilig ætlan fyriliggur í løtuni um at broyta hetta.

Til 2: Sambært tølum frá Studna vildi meirkostnaðurin verið slakar 400 tkr. pr. ár, um skipanin var virkin í 12 mánaðar.

Vinarliga

Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður